# Vón fyri føðideildini

**Ljósmøðurnar tóku væl ímóti uppskotinum um loysn á trætuni á føðideildini, sum Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, barslaði við í gjár**

HEILSUMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sambært forkvinnuni hjá ljósmøðrunum, Eyðfríð Jacobsen, frøast tær um, at Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, endaliga staðfestir, at tað at vera við barn er ikki ein sjúka.

- Hetta er júst tað, sum hevur verið stríðsmálið, og sum vit hava staðið uppá alla tíðina, sigur hon við Sosialin.

### Vóru á fundi

Ljósmøðurnar vórðu róptar inn til fund við landsstýrismannin og leiðsluna á Landssjúkrahúsinum í gjár, mikudagin. Har vóru tær kunnaðar um uppskotið, og fingu boð um at siga frá, um tær standa við uppsøgnunum, í seinasta lagi mánadagin. Fríggjadagin skal nevndin hjá ljósmøðrunum á fund við leiðsluna á Landssjúkrahúsinum.

- Hetta uppskotið líkist avgjørt nøkrum, sum vit kunnu taka undir við, sigur Eyðfríð Jacobsen, sum tó vísir á, at hon sjálvsagt ikki kann vita, um allar ljósmøðurnar taka uppsøgnina aftur enn.

### Ógreiður bygnaður

Í uppskotinum frá Hans Paula Strøm, sum vit hava fingið innlit í frá heilsumálaráðnum, verður sagt, at tann yvirskipaði bygnaðurin fyri ljósmøðravirksemið hevur verið ógreiður tey seinastu 8 árini.

- Skipanarligar broytingar eru gjørdar innan miðfyrisitingina og sjúkrahúsini hesi árini, uttan at skipanin av ljósmóðirvirkseminum er fingin endanliga upp á pláss. Alla hesa tíðina hevur starvið sum leiðandi ljósmóðir verið sett fyribils í avmarkaði tíðarskeið, vanliga í 3 mánaðir í senn, sigur landsstýrismaðurin í uppskotinum.

### Grundarlagið fyri bygnaðinum

Landsstýrismaðurin staðfestir, at tað at verða við barn og føða er normalt og ikki ein sjúka.

- Sjúkrahúsið eigur primert at taka sær av sjúkum, og tí eigur skipanin av ljósmøðravirkseminum at taka atlit fyri hesum, verður sagt. Harumframt sigur hann, at ljósmøður kunnu virka sjálvstøðugt innan normalar/frískar viðgongur, føðingar og aftaná, og at ljósmøður hava virksemi uttanfyri og inni á sjúkrahúsum

- Ein varandi loysn innan fyri Landssjúkrahúsið skal virða leiðslubygnaðin á sjúkrahúsinum, tó við serligu viðurskiftunum hjá ljósmøðrum í huga, verður sagt.

### Bygnaðarliga skipanin

Landsstýrismaðurin skjýtur upp, at ljósmøðratænastan verður skipað sum ein serlig fyrisitingarlig eind á Landssjúkrahúsinum við tilknýti til kirurgiska depilin. Eisini verður skotið upp, at leiðandi ljósmóðir er fakligi, fyrisitingarligi og fíggjarligi leiðarin av ljósmøðratænastuni, og at til hjálpar í leiðsluni kann inni ein yvirljósmóðir verða sett.

- Leiðandi ljósmøðir er ovasti fakligi leiðarin innan ljósmøðravirksemið í Føroyum og vísa allar ljósmøður fakliga til hennara, sigur landsstýrismaðurin í uppskotinum. Og hann staðfestir, at leiðandi ljósmóðirin er innan fyri kirurgiska depilin bygnaðarliga á sama støði sum leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, og vísir til leiðandi yvirlæknan í fíggjarligum og fyrisitingarligum málum.

- Ein týðandi partur av virkseminum hjá ljósmøðrum er á føðideildini (A2) á Landssjúkrahúsinum og skal arbeiðið har verða samskipað við serlæknar og sjúkrarøktarfrøðingar. Grundarlagið fyri býtinum av virkseminum skal vera, at ljósmøðurnar taka sær av tí fríska, meðan sjúkrarøktarfrøðingar taka sær av tí sjúka.

- Tað skulu gerast fastar rættningslinjur fyri, hvat er frískt og hvat er sjúkt, og skulu allir viðkomandi partar luttaka í hesum arbeiðinum, verður millum annað sagt.

Víst verður víðari á, at føðideildin (A2) er ein obstetrisk serdeild, har serlæknin innan økið hevur ta yvirskipaðu medisinsku ábyrgdina og avgerðarrættin. Innan fyri tað neonatala økið á A2 er tað serlæknin innan pædiatri, sum hevur ta yvirskipaðu medisinsku á ábyrgdina og avgerðarrættin.

Hans Pauli Strøm sigur í uppskotinum, at sjúkrarøktarfrøðingarnir á føðideildini eru undir leiðslu av einum deildarleiðara, sum er sjúkrarøktarfrøðingur. Hesin vísir til kirurgisku depilsleiðsluna.

### Føðiskipan

Í uppskotinum sigur landsstýrismaðurin víðari, at sett verður ein føðiætlanarnevnd, sum hevur til uppgávu at tryggja eina góða og vælvirkandi viðgongu- og burðarskipan fyri Føroyum, har atlit verða tikin fyri tvørfakliga samstarvinum til tess at tryggja, at fakliga tilboðið til barnakonur til einhvørja tíð fylgir tilmælum frá heilsustýrinum – við møguligum tillaginum fyri serlig føroysk viðurskifti.



*– Tað at vera við barn er ikki ein sjúka, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður*

# Annað hvørt hús

**Bert annað hvørt húsarhald kann líta á, at drekkivatnið er reint, vísir nýggj kanning frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni**

BRÚKARAMÁL
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hevur rættiliga nógvur orðadráttur verið um reint og skitið vatn. Í Havn hava borgarar og virki fýlst á, at kommunan ikki hevur boðað nóg skjótt frá, tá vatnið var skitið, og neyðugt hevur verið at kóka tað. Men tá hevur bert verið talan um viðurskiftini í høvuðsstaðnum, og hetta hava fólk kring landið kanska undrast á, tí tey hava altíð sligið seg til tols við, at kommunan ikki raðfestir reint vatn. Men nú ber so til at síggja, hvar fólk eiga at kóka vatnið, áðrenn drukkið verður.

### Ivasom reinsan

Sambært nýggju kanningini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fáa 80 prosent av borgarunum sóttreinsað drekkivatn heima við hús. Men samstundis sigur starvsstovan, at sóttreinsingin hjá nógvum kommunum er rættiliga ivasom, og tí kann bert annað hvørt húsarhald líta á, at teirra drekkivatn er reint.

Starvsstovan sigur, at tey 20 prosentini av borgarunum, sum fáa heilt óreinsað vatn, kunnu ikki líta á, at drekkivatnið er reint. Heldur ikki tá talan er um kelduvatn.

### Ónøgd við støðuna

Dánial K. Christiansen, eftirlitsmaður hjá Heilsufrøðiligu Starvstovuni, hevur staðið fyri kanningini, og hevur sjálvur vitjað kommunurnar í kanningartíðarskeiðinum.

- Hóast Starvsstovan als ikki kann vera nøgd við verandi støðu, so havi eg heilt góðar vónir um, at støðan skjótt fer at batna. Fleiri kommunustýrir hava sagt fyri mær, at tey hava sett sær fyri at tryggja borgarunum reint drekkivatn í hesum valskeiði. Haraftur at er ein kunngerð í væntu", sigur Dánial K. Christiansen.

### Viðbrekin fiskavirki

Eitt, sum mangan verður havt á lofti, tá umræður vatngóðsku, eru trupulleikarnir í fiskivinnuni, tá kommunurnar ikki síggja til, at reinsa vatnið væl. Reint vatn er ein fortreyt fyri útflutningi av matvørum, og tí skal góðskan altíð er fyrsta floks. Sambært kanningini hjá starvsstovuni, lítur annaðhvørt fiskavirki ikki á kommunalu sóttreinsingina, men reinsar vatnið sjálvt.

### Kanningargrundarlagið

Heilsufrøðiliga Starvsstovan vitjaði allar kommunurnar í tíðarskeiðnum juni 2005 til juli 2006, fyri at staðfesta hvørjum standi vatnveitingarskipanirnar eru í.

Í teimum 33 kommununum eru meira enn 118 óheftar vatnveitingarskipanir. Bert 39 teirra sóttreinsa drekkivatnið. Meira enn 79 skipanir hava onki sóttreinsingartól. Tað eru serliga tær smærru skipanirnar, sum mangla sóttreinsingartól.

Í minsta lagi 15 vatnveitingarskipanir eru privatvatnfeløg, og fáa 2500 borgarar vatn frá privatu vatnfeløgunum. Fleiri kommunur hava ætlanir um at yvirtaka privatu vatnfeløgini.

### Til mat og drekka

Sambært Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, er drekkivatn ætlað at drekka ella brúka í matframleiðslu. 80 prosent av føroyingum fáa sóttreinsað drekkivatn í krananum, og er endamálið við sóttreinsingini, sum fer fram á reinsiverkum, at drepa bakteriur, virus og snúltarar. Tað mesta vatnið, sum brúkt verður til drekkivatn, er omaná vatn og restin er kelduvatn.

Næstan allar kommunur veita drekkivatn til síni húsarhald, bert í onkrari minni kommunu eru privat vatnfeløg. Einstøk matvøruvirki, og tá serliga fiskavirki, sóttreinsa vatnið sjálvi.

### Lógarkrøvini

Matvørulógin og umhvørvisverndarlógin fevna um drekkivatn. Umhvørvislógin skal verja drekkivatnsøkið ímóti dálking av ymiskum slag, meðan matvørulógin skal tryggja, at drekkivatnið lýkur góðsku- og heilsuverndarkrøv. Vatnveitarar ábyrgdast fyri at krøvini eru lokin og tryggja hetta við sínum egna eftirliti, og Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eftirlit við, at vatnveitararnir røkja sínar skyldur.

